# Lívið sum listaverk

**Ekspressionistiska árinið er sum so rættiliga óorginalt, klisjékent og gamaldags, men tá tað verður nýtt konsekvent við sál av einum sonnum originali, gerst úrslitið ongantíð óáhugavert. Hetta heldur ummælarin, ið metir framsýningina hjá Øssuri Johannesen, sum í løtuni er at síggja í Listaglugganum í Havn, veita eina øðrvísi listaupplivíng, har áskoðarin hevur høvi at síggja nýggjasta partin av einum framhaldandi lívslistaverki**



## Ummæli



Kinna Poulsen

Hvørt sjálvslýsingar innan myndlistina eru sjónlig dømi um fakligan stoltleika og sjálvrós, ella sjálvsmyndin er ein meira intellektuelt vinklað roynd at geva avvarðandi listaverki eyka dýpd, er ikki altíð lætt at meta um, men listafólk hava líka síðan endurburðartíðina málað sjálvsmyndir, eins og tey hava sett seg sjálvi inn í lýsingar av øðrum. Kend dømi um hetta eru Jan Van Eyck, sum í sínum portretti av Arnolfinibrúðarparinum í 1432, málaði seg sjálvan í tí útbogaða spegilinum miðskeiðis í myndini og Diego Vélazques, sum góð tveyhundrað ár seinni fekk seg sjálvan við í lýsingini av umhvørvinum kring sponsku kongafamiljuna, sum er kend undir heitinum "Las Meninas" (Hovdamurnar).

Við modernismuni vant áhugin fyri tí subjektiva upp á seg og hervið fingu vit eyðvitað fleiri sjálvslýsingar innan listina, sum eisini sprongdu mørkini fyri hvussu vit vóru von at síggja listafólk umboða seg sjálvi í lýsingum, ið nú loyvdu tí ljóta og dapra at gerast sjónligt eins og vit í mong ár hava upplivað tað í myndunum hjá Øssuri Johannesen, ið taka støði innan norðurlendska og týska ekspressionismu (t.d. Edvard Munch, James Ensor og Käthe Kollwitz).

### Eitt heildarlistaverk

Ekspressionistiska árinið í hesum myndunum er sum so rættiliga óoriginalt og gamaldags, samstundis sum tú ongantíð ivast í hvør upphavsmaðurin til verkini er. Sum hann situr har, listamaðurin, eitt sindur óstillur í framsýningarhølinum við einum tignarligum, innfjarum smíli, kemur tað mær fyri, at hann sjálvur er partur av listaverkinum.

Hóast tað síða hárið er demonstrativt ófriserað og stendur í allar ættir og buksurnar eru skræddar, so at knæskelin, tann eina er úrlatin, er okkurt fullkomiliga tilvitað yvir svarta og reyða litavalinum og stílinum sum heild, ið hóskar, nei er ein partur av einum stórum outsider-art-heildarlistaverki, sum er Øssur Johannesen. Og hetta er óansæð, hvørt talan er um hansara tónleik, tær mongu fløgurnar og myndirnar, yrkingarnar, greinarnar ella øll brøvini, sum eru skrivað við stórum blokkbókstavum úr sprittusj. Tað er eisini klæðini, gittarin, mátin, hann stillar upp til fotografering og mátin, hann á síni myspace heimasíðu greiðir frá sínum hetjum og sínum egna persónliga, viðkvæma sinni, sum til tíðir køvist av depressjón og pínu. Alt hetta og meira er partur av lívslistaverki Øssurs.

### Anti-sofalist

Í hesum førinum kunnu vit ikki tosa um eitt listafólk, ið eins og áðurnevndu Vélazques og Van Eyck málar seg sjálvan inn í lýsingar av nøkrum øðrum. Tí hyggja vit nærri at persónunum í hesum myndunum, líkjast teir allir listamanninum, og tað er óansæð, um vit hyggja at tí krossfesta, gittarspælaranum, ella tí deyða. Myndin "Deyðin, havið, eldurin og tónleikurin" er eitt gott dømi um, hvussu listamaðurin byggir sínar myndir upp á sera einfaldan hátt við greitt avmarkaðum figurum ella myndaliðum, sum eru settir á myndaflatan uttan realistisk fyrilit eins og eitt barn kundi gjørt tað. Men árinið tykist tó meira rituelt upprunaligt og religiøst grundað, enn barnsligt, orsakað av tí myrka og avmarkaða litavalinum og trýbýtingini av myndaflatanum. Bæði myndevni og perspektiv geva somuleiðis hugasamband við eitt listaslag við føstum reglum eins og miðaldarlist ella egyptisk list við tignaðarskipaðum perspektivi, har tann mest umráðandi figururin eisini er størstur á myndini.

*Framsýningin hjá Øssuri Johannesen er ein øðrvísi listaupplivíng, heldur ummælarin*

Á framsýningini eru fáar, stórar myndir, sum hvørki í støðd ella í vali av myndevni kunnu sigast at sleikja fyri múgvandi listasamlarum og bara fyri tað hevur framsýningin uppiborið mítt besta viðmæli.

Framsýningin í Listaglugganum, A.C.Evensensgøta 11 er opin inntil 10. november.